# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Vinnulívsmaðurin Hans á Bakka 70 ár

Hans Jacobsen er føddur 29. november 1938 á Glyvrum, hann er sonur Johan Hendrik Jacobsen av Glyvrum og Jüttu Sophie Jacobsen, f. Jørgensen úr Miðvági. Hans er giftur við Oddvør, f. Simonsen úr Heiðunum, og eiga tey saman børnini: Regin, Jastrid, Anniku, Birnu og Rógva. Harafturat eiga tey 13 abba- og ommubørn.



*Hans og Oddvør í Ísrael í 2006*

Barnaárini á Glyvrum vóru nokk sum hjá børnum flest, men hesi árini undir krígnum var ikki nógv materielt. Pengar vóru nærum eingir, og lítið kundi keypast. Omma dugdi væl við lítlum, og heimið var fult av kærleika og gleði. Samanhaldið millum húsini á Bakka var gott. Abbi, Gammi og helst hinir brøðurnir eisini vóru sera skemtiligir og lættir av lyndi, og dugdu væl at síggja lívsins góðu síðir. Abbi var svorin avhaldsmaður, losjumaður og kirkjumaður.

Í 1945 var Hans sjey ára gamal, og byrjaði í skúlanum á Glyvrum, har Bjarnadal og konan vóru lærarafólk. Skúlin tey nýttu var tann lítli skúlin, sum stendur sunnan fyri Forna, “Gamli skúli” sum vit siga. Har var bara ein lítil stova, og einki annað rúm uttan ein lítil durur. Øll børnini vóru í sama høli frá yngst til elst; men tað gekk eisini. Tað var ikki óvanligt, um góðveðursdagar vóru, at børnini fóru tíðliga upp saman við teim vaksnu at hjálpa til at breiða fisk út á fiskastykkinum áðrenn tey fóru í skúla. Børnini skuldu vera við, tað var plikt.

Liðugur við barnaskúlan fór Hans í 1953 á Háskúla í Hornabø, har Marius Johannesen var fyrsti lærari. Aðrir lærarar vóru: Símun av Skarði, Sigurd Joensen og Pól Johannes Lindberg. Hetta árið á háskúla hevði avgerandi týdning fyri Hans, og dámdi honum sera væl hetta árið.

Tá hetta árið var liðugt á háskúlanum var Hans 15 ár, hetta var í 1954. Neyðugt var at vinna pening fyri at kunna ganga víðari í skúla. Í 1954-1956 hjálpti hann til í Turkihúsinum á Glyvrum. Tað var P/F Ryggur, sum pápin og brøðurnir áttu í felag, sum hevði virksemið.

Teir vaskaðu og turkaðu fisk. Stóri fiskurin var turkaður til Spanien, hann var vanliga turkaður úti á fiskastykkinum. Tað gav besta prísin. Eftir 1950 var tað serliga fiskur sum var keyptur frá skipunum úr Grønlandi. Smærri fiskurin úr Grønlandi var turkaður inni.

Summi ár var nógv turkað til Italien og Portugal, men summi ár var meir turkað til Brasilien. Fiskurin til Brasilien varð vaskaður og stakkaður uttan salting, so hann gulnaði, áðrenn hann var turkaður, hann skuldi ræstna nakað, síðani var hann hart turkaður næstan sum træ og var pakkaður í smáar tunnur.

Sum 17 ára gamal fór Hans í 1956 á Handilsháskúla á Købmandshvile í Rungsted, við Keypmannahavn. Har lærdi hann grundreglurnar í handilsskapi og bókhaldi og fekk ástøðilgar førleikar fyri vinnuvirki.

Tað var tradisjón í familjuni at reka handil. Abbi Hans hevði rikið handil niðri á Bakka og Meinhard, farbróðurin, handlaði eisini eitt skifti í húsunum hjá sær. Hans var skjótt greiður yvir, at hann mátti fáa nakað av kunnleika til handilsskap, og hetta gjørdist bíligast og skjótast við at fara á handilsháskúla í Danmark.

Í juli 1957 kom hann heimaftur til Føroya, og fór at hjálpa til í turkihúsinum, har tey turkaðu fisk.

Tá Hans var 18 ár í 1957, var broyting í vinnuligu viðurskiftunum á Bakka. Turkihúsini høvdu um hetta mundið sæð sínar bestu dagar. Tað blivu nú bygd flakavirkir ymsa staðni, og skjótt var at eingin ráværa var til turkingar. Bakkamenninir ætlaðu eisini at ganga hesar nýggju leiðirnar, men tá virkið var bygt í Heiðunum, var ikki grundarlag fyri fleiri flakavirkjum her á leið.

Virkið á Glyvrum fór av knóranum. Róland keypti bygningin aftur frá Sjóvinnubankanum nakað seinni. Eftir at vinnuvirksemið varð steðgað á Bakka, fór Johan Hendrik, pápi Hans, at byggja hús fyri fólk. Hann hevði arbeitt sum húsasmiðjur fyrr, hevði m.a. verið við at bygt kirkjuna á Glyvrum og í Vági. Fyrsta húsið teir tóku uppá seg var fyri Gunnar Olsen á Glyvrum.

Samstundis sum Hans arbeiddi saman við pápanum, alt meira og meira við at byggja og umvæla hús, búnaðist ætlanin, at stovna egið virkið. Húsini vóru bygd við handilshøli í kjallaranum, við góðari hjálp frá pápa og hjálp frá familjuni, serliga Gamma (Klæmint) og Martin pápabeiggjanum. Klárt var at opna handilin í 1959. Hans bygdi fleiri hús saman við pápanum, teir bygdu eina røð av húsum hesi næstu árini – eini 10-12 ialt.



*Mikudagin 14. apríl 1965 giftust Hans og Oddvør. Tey vóru vígd í Glyvra Kirkju henda góðveðursdagin í apríl. Tá komið var úr kirkjuni, spældi hornorkestrið hjá Nes sóknar musikfelag. Um hetta mundi spældi Hans við í orkestrinum. Brúdleypið varð hildið í Glyvra Bio*

Eisini var hann um hetta mundi nógv uppi í losjuarbeiðinum, kappróðrarfelag bleiv stovnað og av og á vóru boð at sparka fótbólt við Toftamonnum við ”ZIG ZAG”.

### Vinniliga virkið hjá Hans:

Í 1968, tá Hans var 29 ár, byrjaði hann saman við brøðrunum Rólant og Martin í smáum sildaframleiðslu á Bakka, bygdu fyrsta virkisbygningin hjá Bakkafrost. Fólkið við Skálafjørðin hevði nógv við sild at gera.

Í nógv ár hevði eingin sild verið, men í 1967 byrjaði sildin at koma aftur. Klæmint og Róland royndu eftir sild, og Hans kom í samband við tveir danar, sum høvdu møguleika at selja sildina til danir í spannum.

Hetta var neistin til fyrsta Bakkafrost. Seinni bleiv keypt frá ymsum bátum á Skálafjørðinum og frá sildabátum av Sandoyarbankanum. Sildin var saltað, kryddað og súrgað. Ein ’Arenko’ flakamaskina var keypt í 1970 sum skjótt og effektivt kundi flakaskera nógva sild. Henda var keypt umvegis Marr & Co, hon var keypt frá Lübbert í Týsklandi. Tá var nógv sild at fáa, og var sildin m.a. seld til Abba í Svøríki, eisini var skorið fyri Nyk á Toftum sum keypti frá ymsum bátum. Nykur hevði eisini gjørt avtalu við Marr & Co um sølu til Abba, men teir høvdu onga maskinu. Flakamaskinan stóð í lítla virkisbygninginum, sum ídag er kantinan á Bakkafrost. Um hetta mundið varð kannað um tilbar at keypa hermetikklinjuna frá Kjølbro í Klaksvík, tað vísti seg at bera til at fáa hesa til



*Jóan Hendrik og Jútta saman við børnunum. Aftan frá vinstru: Róland, Hallgerð, Martin, Jóhanna og Hans. Myndin er tikin 1985*